## Eiðisverkið skal útbyggjast

Arbeiðið varð boðið út í innbodnari licitatión millum tey trý byggifeløgini, Articon, J&K Petersen og MT Højgaard, og tilboðini liggja millum 7,7 og 9,4 mió. kr.

Lægsta tilboð hevur MT Højgaard uppá 7,789 mió. kr.

Tilboðið hjá Articon er uppá 8,254 mió. kr., og J&K Petersen bjóðaði sær at gera arbeiðið fyri 9,454 mió. kr.

Kostnaðarmetingin frammanundan hjá ráðgevandi verkfrøðingafelagnum Landsbyggifelagnum ljóðaði uppá 8,5 mió. kr.

Arbeiðið umfatar nakað av spreingiarbeiðið og at byggja 11 metrar uppí verandi betongbygning norðureftir, har triðja turbinan á verkinum skal setast upp.

Útbyggingin av Eiðisverkinum er liður í Eiði 2-vatnorkuútbyggingini, sum fer at veita SEV 16 GWh aftrat teimum 40 GWh, sum í løtuni verða veitt í Eiðisvatn.

Landsbyggifelagið fer nú at nærlesa innkomnu tilboðini og síðani gera tilmæli til SEV um, hvør ið skal gera arbeiðið at útbyggja Eiðisverkið.

Triðja turbinan er bíløgd og kemur til Føroya næsta summar. Hon skal eftir ætlan takast í nýtslu, tá uppíbyggingin er liðug um ársskiftið 2011/2012.

Turbinan kostar umleið 20 mió. kr. Hon er uml. 7,3 MW, umleið 0,5 MW størri enn hinar báðar.

Eiði 2-verkætlanin umfatar gerð av einum 7,8 kilometrar longum vatntunnli frá Norðskála suður til Veðranes. Boriarbeiðið byrjar væntandi umleið 1. august og skal eftir ætlan vera liðugt fyrst í 2013. Byggisamtakið MT Højgaard og J&K Petersen stendur fyri hesum arbeiðnum.

# Ung talent spæla

**TÓNLEIKUR** Føroyska tónaskaldið Pauli í Sandágerði vitjar í vikuni í Føroyum saman við kóri og ungum talentum úr Danmark, sum skal spæla fyri føroyingum

Eyðun Klakstein

Í hesum døgum verða Summartónar hildnir. Nógvar konsertir og framførslur eru á skránni, og millum tey, sum vitja í Føroyum, er tónaskaldið Pauli í Sandágerði, sum er búsitandi í Danmark.

Við á ferðini til Føroya er kórið Armonija, sum skal hava konsert saman við Cantabile í Norðurlandahúsinum mikukvøldið og í Christianskirkjuni í Klaksvík hóskvøldið.

Armonija er eitt kór frá musikkskúlanum í Vejle, sum Pauli í Sandágerði hevur verið við til at menna. Føroyska kórið Cantabile er partur av hesari menning, tí nú skulu kórini syngja saman.

Á konsertini í Norðurlandahúsinum og í Christianskirkjuni fara eisini tvey ung talent úr Vejle at spæla. Tað eru systkini Camilla og Jonas, sum vóru við í sendirøðini Talent. Tey bæði duga óføra væl at spæla á síni ljóðføri, og tey fara at framføra nøkur verk. Camilla spælir floytu, og Jonas spælir gittar.

Konsertin í Norðurlandahúsinum er mikukvøldið kl. 19.30, og konsertin í Christianskirkjuni verður hóskvøldið kl. 20.00.

eydun@sosialurin.fo



Camilla spælir floytu



Jonas spælir gittar

## Í DAG

8/ 13 °C



3-8 m/s 3-8 m/s

Lot til andøvsgul av landsynningi og eystri, 3-8 m/s, sum í kvøld snarar í ein landnyrðing og norðan. Mest skýggjað við regni og ælingi av og á og til tíðir mjørki. Í nátt skiftandi skýrák og mest turt. Hitin alt samdøgrið millum 8 og 13 stig.

## TÝSDAGIN

10/ 13 °C



3-8 m/s 3-8 m/s

Lot til andøvsgul av norði, 3-8 m/s. Fyrrapartin mest skýggjað og kanska ælingur, annars turt við nakað av sól. Hitin um dagin 10 til 13 stig, um náttina 7 til 10 stig.

## MIKUDAGIN

8 / 12 °C



3-8 m/s 5-10 m/s

Lot til andøvsgul av ymsum ættum, 3-8 m/s. Turt og nakað av sól. Um náttina gul til stívt andøvsgul av landsynningi, 5-10 m/s. Turt og hálvskýggjað og hitin millum 8 og 12 stig

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst í ein sunnan og útsynning úr Føroyum ferðast spakuliga í ein landnyrðing og grynnist, men hevur framvegis regn við sær komandi døgnið.




Mikudagin verður ein veikur hátrýstryggur yvir Føroyum, og fylgjandi dagarnar fara brúgvaløg við regni at reka inn yvir Føroyar av útsynningi.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 61 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 5 | Tromsø | 6 | Moskva | 16 | Athen | 26 |
| Reykjavík | 11 | Bergen | 12 | Berlin | 25 | Beijing | 30 |
| Tórshavn | 10 | Oslo | 22 | Paris | 20 | New Dehli | 30 |
| Lerwick | 9 | Stokkhólm | 20 | Madrid | 28 | Bangkok | 34 |
| Aberdeen | 12 | Keypmannah. | 19 | Róm | 26 | Sydney | 14 |
| London | 19 | Helsinki | 16 | Malorca | 26 | New York | 33 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

26. juni — Fullmáni
1. juli — Mánin longst frá jørðini
4. juli — Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 28. juni | 09:00 | 21:22 | 08:00 | 20:22 | 08:15 | 20:37 | 11:00 | 23:22 | - | 12:00 | 07:15 | 19:37 | 06:15 | 18:37 | 09:15 | 21:37 | 10:15 | 22:37 | 08:45 | 21:07 | 10:00 | 22:22 |
| 29. juni | 09:44 | 22:04 | 08:44 | 21:04 | 08:59 | 21:19 | 11:44 | - | 00:22 | 12:44 | 07:59 | 20:19 | 06:59 | 19:19 | 09:59 | 22:19 | 10:59 | 23:19 | 09:29 | 21:49 | 10:44 | 23:04 |
| 30. juni | 10:24 | 22:43 | 09:24 | 21:43 | 09:39 | 21:58 | 00:04 | 12:24 | 01:04 | 13:24 | 08:39 | 20:58 | 07:39 | 19:58 | 10:39 | 22:58 | 11:39 | 23:58 | 10:09 | 22:28 | 11:24 | 23:43 |
| 1. juli | 11:03 | 23:21 | 10:03 | 22:21 | 10:18 | 22:36 | 00:43 | 13:03 | 01:43 | 14:03 | 09:18 | 21:36 | 08:18 | 20:36 | 11:18 | 23:36 | - | 12:18 | 10:48 | 23:06 | - | 12:03 |
| 2. juli | 11:39 | 23:57 | 10:39 | 22:57 | 10:54 | 23:12 | 01:21 | 13:39 | 02:21 | 14:39 | 09:54 | 22:12 | 08:54 | 21:12 | 11:54 | - | 00:36 | 12:54 | 11:24 | 23:42 | 00:21 | 12:39 |